gult cyan magenta svart






**100 ár**

# Skaldi› Chr. Matras – í brotmynd

## Andin upp úr sjónum

Andin upp úr sjónum
hann stendur gjøgnum loft,
hann rekur upp um bakkan
og inn í tún og toft,
hann er vi› hellustrendur,
hann er, har berg er bratt,
og fórt tú upp á fjalli›,
var hann har úr hvørji ætt.

Andin upp úr sjónum,
tá dey›ast er vi› strond,
er mjúkur eins og náttin,
i› sígur yvir lond,
hann nemur vart vi› allar
sum eitt lukkubroyski› ljó›,
hann er eitt ósætt undur,
sum ber ófri› í várt bló›.

Andin upp úr sjónum,
tá i› fló›in legst um Spor,
ber fló› í mannahugar,
so vit finna ikki or›.
Tá bragda gó›rarmegir
vi› fjørufuglavass,
tá yngist ellishugur
vi› barnafótatvass.

Andin upp úr sjónum,
tá blámagrøn er vík,
og flesjar liggja undir
og sei›aberg og brík,
og Váti Klettur sprænir
ein hvítan foss frá sær,
er tá ein trølskur andi,
sum spyr um menn og far.

Andin upp úr sjónum,
tá i› óført er og ódn,
hann dregur út á bakkan
bæ›i tilkomin og børn
at sko›a trøllaleikin,
har sjógvur berst vi› land,
og drekka upp í hugan
ein ræ›sludæmdan gand.

Andin upp úr sjónum,
í ódn og d‡rdarlogn,
er gandurin í okkum
og lívs várs egin ogn.
Vit fáa ikki mist hann,
fyrr enn sloka› er várt log,
hann ver›ur sí›sta heilsan,
hann var várt fyrsta bo›.

*»Jól uttanlendis«, 1941*

## Snjól‡si stó› av fløtum

Snjól‡si stó› av fløtum.
Vit skreiddu á tjørn sum ein flugufjøld,
tá i› nátt kom á.
Tá vaks vi› ljódligum veldi
hamari ramur úr kvøldi,
og hátt kr‡ndi himin vi› stjørnum
høvur á hvítari fold.

*Var›in, 1929*

*He›in M. Klein*

*Morgunin* er eitt umrá›andi myndevni og eitt afturvendandi tema í fleiri av yrkingunum hjá Kristjani Matras, serliga tey seinnu árini, og skilligt er, at skaldi› leggur ein ávísan s‡mbolskan t‡dning í sínar morgunl‡singar. Yrkjarin kennir morgunin á sær, ella heldur *innan í* sær, sum eina n‡byrjan, hetta: at fara undir ein á›ur ósæddan dag vi› ø›rvísi møguleikum, eina undranarverda kropsliga og sinnisliga reinsan, ja eina endurfø›ing, so at skaldi›, sum morgnarnir vitja, kann ganga undir náttarlon – *vi› áarfrískum anda.*

Hesin andin er, haldi eg sjálvur – hvørt hann so er *áarfrískur* ella *andin upp úr sjónum* – málandi ey›kennislag í øllum skaldskaparkompositiónunum hjá Kristjani á Brekkumørk. Eg hugsi um henda serliga sansaliga frískleikan. Alsamt kenst skaldskapur hansara líka upprunaligur, klárur sum kelduvatni›, ramur sum sjórámin, einfaldur. Undirrita›i dugir ikki at síggja, er hann er naka› petti eldur vi› árunum, tvørturímóti.

Í turrisligum skaldskaparligum ella bókmentasøguligum yvirlitum ver›ur Chr. Matras ivaleyst flokka›ur sum náttúrul‡rikari *par excellence.* Ta› kann væl vera. Men har er eisini okkurt anna›, sum liggur undir.

Hjá Kristjani á Brekkumørk var so nógv, sum var munandi ø›rvísi – og tí mátti ver›a ø›rvísi or›a› – enn tann naknari málbur›urin í tjó›skaparromantiska skaldskapinum undan honum. Hjá honum bar ikki til at siga sovor›i› sum "eg elski teg land" ella "mítt kæra Vi›arei›i." Skaldi› Chr. Matras var sum a›rir yrkjarar, i› veruliga gera mun, noyddur at rudda grund og leggja n‡tt stø›i undir yrking sína, so at hann kundi geva sínum náttúrukenslum og teimum menniskjansligu kenslum ljó›, i› strongdu á og bó›u um or›, i› ikki fyrr høvdu veri› solei›is søgd á føroyskum. Nógv av tí, sum á skræ›uni lítur út sum náttúrul‡rikkur, er í veruleikanum eisini tilveruskaldskapur. Eisini menniskjan er náttúra, óloysiligur partur og bundin av a›rari náttúru. Fyrsta yrkingasavni› hjá Kristjani Matras, *Grátt, kátt og hátt* (1926), lesi eg fyrst og fremst sum eina ramliga tilveru-n‡tulkanarroynd, at siga alt sum ta› er!

Náttúrumagni› á Vi›arei›i og útss‡ni ha›ani vóru, sum vit øll vita, tann kveikjandi login undir skaldskapinum hjá Kristjani Matras. Sjálvur hevur hann lati› okkum lykilin til fullfíggja›a fatan av sínum skaldskaparheimi: "hon (náttúran) var ta› vandamikla, ta› ræ›uliga, ta› magnmikla – og ta›, sum var blí›ari og fri›sælari enn alt ta›, sum hugurin fær lofta›." Hetta, sigur skaldi›, "var fyritreytin hjá tí, at ein kom at meta logn og fri›sælar løtur sum mátt í hægsta lagi." Ta› ber bo› um sjáldsamt og ey›s‡na fjølbroytt náttúruveldi, at yrkjarin ha›ani fær ljó› bæ›i fyri tí rama og heidna, fyri tí blí›a og ófatiliga fri›sama og, ikki minst fyri kenslu síni av rúmd og endaloysi, hesi tr‡ høvu›stemu hansara. Har eru rættan og rangan á oynni. Har eru fløtan og ei›i›, hæddin og havi› – og menniskjan í øllum hesum náttúrunar stórbæra margfeldi. Har eru d‡rdin og ódnin. Men har er eisini ta› gerandisliga. Vi› listarliga kynstri sínum megnar skaldi› Chr. Matras sum vi› gandi at flyta *mikrokosmos,* i› er Vi›arei›i ella Vi›oyggin, yvir í *makrokosmos,* yvir í alheimin. Av tí sama hava hansara bestu yrkingar í sær, tó at tær ítøkiliga kunnu vera anna›hvørt sta›- ella tí›arbundnar ella bæ›i, ein sjáldsama alheimligan og tí›arleysan, ein *universellan,* tóna.

Undirrita›i fær neyvan vi› stuttum skotbrá lagt naka› munaligt afturat um eldru yrkingarnar hjá Kristjani á Brekkumørk, sum ikki onnur longu hava sagt. Men tær yngru yrkingar hansara eru, tykir mær, heldur líti› vi›gjørdar enn. Chr. Matras útinti á síni longu ævi so mong brøgdini – í vísindum, í t‡›ing og í ø›rum vi›, sum líti› ver›ur sagt um og einki ver›ur vi›gjørt í hesum greinastubbanum. Eitt bragdi› var ta›, at hann á ellisárum megna›i at taka upp n‡ggjan tátt í síni yrkingarlist, at hann í tóna og sni›i evna›i at endurn‡ggja sín l‡riska skaldskap.

N‡liga flutt til Danmarkar: Marianna, Árni, Kristjan og Eirikur (í vogninum)

*Ungur yrkjari*

*Tveir brø›ur av Brekkumørk: Hans Jakku og Kristjan (tann yngri)*

Okkurt av hesum man tó – longu – hava veri› har frammanundan. Ta› duga vit betur at síggja nú. Ein undandøttur í hesum skaldskapartátti vóru, i› hvussu er, nakrar heilt fáar yrkingar í 1930-árunum. Tann ey›kendasta, skapa› í 1934 ella 1935, er henda:

*Eg møtti eini gentu.*
*Og eg kendi hvussu vári ›*
*fór sum lívgandi væti*
*gjøgnum alt sum er til.*

Skaldi› man sjálvt hava veri› eitt sindur kløkka› og ørkymla›, ella i› hvussu er eitt sindur ivasamt, um hesa gó›u yrking, tí at ikki var hon prenta› fyrr enn í Var›anum 1962. Í 1960 ver›ur yrkingin *Morgun í Havn* til. Annars tekur hesin tátturin í skaldskapi Kristjans seg ikki upp av álvara fyrr enn fyrst í nítjanhundra›ogsjútiárunum.

Bera vit saman vi› a›rar yrkingar hjá Kristjani Matras, so sæst t‡›iligur munur. Í yrkingabólkinum um *Páll fanga* (1935) letur hann Páll taka so til or›a: *Eg vildi bróta til mergjar / at royna trúnna úr for›um.* Hetta, kunnu vit av røttum siga, gjørdi Chr. Matras sjálvur, myndarliga tala›, í eldru yrkingum sínum, bæ›i innihaldsliga og málsliga, í reglufast skipa›um ørindum vi› føstum stevi og rútmu. Í teimum n‡ggju yrkingunum ver›ur málsliga einfeldin avgerandi, rútman leysari, ørindislagi› meira streymandi.

Ta› er altí› vági› at fara aftur um sló›ina hjá einum yrkjara. Men kanska fari eg ikki heilt skeivur, tá i› eg nevni onkra eysturlendska ávirkan. Eitt nú kann ta› vera nevnt, at Chr. Matras í ummæli í Var›anum 1974 av *Flytifuglum, savni av útlendskum yrkingum* tekur m.a. solei›is til um nakrar av yrkingunum eftir Ho Chi Minh, *at tær eru: so sterkur og sannur skaldskapur, at eg eri um at halda hann vera besta skald í øllum flokkinum.* Lesarin kann sjálvur ætla um og eisini




**100 ár**

## Ta› er ei logn

Ta› er ei logn, ei kyrrubrøgd
i› valda lívsins vøllum,
ta› er hin mikla sk‡fer›in
sum s‡nir gongd í øllum,
ta› er tann sterka sjón
i› elvir størstu vón,
i› veit at lív á jør›
er fer› um vandafjør›
og d‡rt er her at sigra.

*»Á Hellu eg stó›«, 1972*

## Fjarlagt hvesti hann sjógvin

Mjúkliga myrkri› seig.
Og børn um hógv undir gør›um.
Mál teirra gomul hoyggjhúshur›
har gisna›ur vi›ur lak
út søtan anga í kvøldi›.

Fjarlagt hvesti hann sjógvin
á undurnátt millum fjalla.

*»Á Hellu eg stó›«, 1972*

## Hagin

Fer mjørkarák um kinningar,
um brekkugrøs og br‡r,
tá kyknar upp til minningar
tann d‡rdin, í mær b‡r
frá fyrstu fer›, i› hagin kva›,
so eg í undran lá,
og sál var um at bresta,
tí eg einki fekk sagt frá.

*»Úr leikum og loyndum«, 1940*

## D‡rdarkvøld móti hoybur›artí›

D‡rdarkvøld móti hoybur›artí›.
Ví›ur heimur at fer›ast í.

Nor›l‡si livir um hoyggja›an vøll.
Stjørnur l‡sa um hægstu fjøll.

Myrkur dvølur vi› bakkastrond.
Himins ljós ganga kyk um lond.

Angan av sátum, skróvan av strá.
Lí›andi náttin komin á.

Alt var so stórt í heimsins høll.
Gekst har barn yvir hoyggja›an vøll.

*»Á Hellu eg stó›«, 1972*